Helgi Fossádal um ríkisflaggið:

# – Eitt frískt hugskot

**Helgi Fossádal, sum er leiðari fyri Listasavn Føroya, gav sjálvur loyvi til, at nýggja ríkisflaggið skuldi sleppa at hanga á tjóðarsavninum í eina viku. – Eg helt ikki, at tað gjørdi nakran skaða, sigur hann**

RÍKISFLAGGIÐ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Nýggja tjóðarflaggið hevur fingið eina blandaða móttøku. Summi halda tað vera eitt frálíkt hugskot, meðan onnur halda tað vera forkastiligt.

Men tað, sum kanska serliga undrar nógv folk, óansæð hvørja hugsan tey annars hava um flaggið, er , at tað sleppur at hanga á okkara tjóðsavnið í eina viku. Náláreygað, at sleppa inn í Listaskálan, er jú lítið, sigst.

Tí ringdi Sosialurin til Helga Fossádal, sum er leiðari á Listasavnið Føroya.



*Nýggja ríkisflaggið hongur á tjóðsavnið Føroya, Listaskálanum. Meiningarnar um flaggið eru ymiskar, men fleiri hava undrast á hvussu flaggið, uttan nakað hóvasták, er sloppið inn á savnið. Men áhugin er stórur, og heilt nógv fólk hevur verið og hugt at flagginum.*

*Mynd Bárður Lydersen*

**Stjórin gav loyvið**

Hvør sleppur at sýna fram á Listasavnið Føroya?

– Vit fáa umsóknir. Listasavnið móttekur vanliga umsóknir frá listafólki, ið søkja um at sleppa innar at sýna fram.

*Men hvør tekur so støðu til umsóknirnar, og ger av hvør skal hava játtandi svar?*

– Allar umsóknirnar, sum koma inn, verða umrøddar av stýrinum fyri savnið, sum eisini ger av, hvørjar umsóknir fáa játtandi svar og sostatt hvørji listafólk sleppa at sýna fram.

*Og hvussu ofta verður støða tikin til tað?*

– Vit leggja eina framsýningarætlan fyri Listaskálan eina ferð árliga. Ætlanin fyri 2005 var løgd seinast í 2004. Tað verður altso eina ferð árliga avgerð tikin um, hvør skal sleppa at sýna fram komandi árið.

*Men hvørjar vóru fortreytirnar fyri, at nýggja flaggið slapp inn á Listasavnið at hanga? Og hvør tók brádliga ta avgerðina?*

– Ta avgerðina havi eg tikið. Eg varð spurdur um flaggið kundi hanga her í eina viku, og eg helt, at tað var eitt frálíkt hugskot. Eg helt ikki, at tað kundi gera nakran skaða, svarar Helgi Fossádal.

**Kontaktir onga ávirkan**

*Men hevur tað ikki havt sína ávirkan, at summi av fólkunum aftanfyri ríkisflaggið hava tilknýti til Listasavnið?*

– Nei, tað hevur yvirhøvur einki við tað at gera. Tað fáa fólk tað sjálvandi til, beinanvegin, men tað hevur ikki havt ávirkan. Hetta er ein avgerð, sum eg havi tikið, tí eg helt hetta verða eitt frískt hugskot. Um tað hongur her uppi, so fær tað eisini nakað av reklamu.

*So um eg finni upp á okkurt, sum er frískt og øðrvísi, og sum ikki ger nakran skaða, so sleppi eg kanska eisini inn í Listasavnið í eina viku?*

– Nei, tað veit eg ikki. Tað skalt tú ikki rokna við. Tað sum var, var at eg helt hetta vera eitt stuttligt happening. Eg bleiv spurdur um tað kundi hanga her, og eg segði ja, tí eg helt hetta vera nakað serligt, svarar Helgi Fossádal at enda.

## Vágs POP

**Olaf**



*Hvat heldur tú um hetta nýggja flaggið?*

– Eg havi slett ikki sæð tað enn. Men eg haldi, at tað ljóðar sum eitt gott hugskot at hava eit felags flagg.

*Heldur tú, at tað kann koma undir heitið »list«?*

– Ja, tað kann tað gott.

*Er tað í lagi, at tað er sloppið at hanga í Listaskálanum, sum er tjóðsavnið?*

– jaja, tað haldi eg er í lagi.

**Inga**

*Hvat heldur tú um hetta nýggja flaggið?*

– Tað er provokerandi mótvegis loysingarsinnaðum og tjóðveldisfólki. Og eg haldi næstan, at tað er ein gáva til sambandsfólk. Men tað er eisini ein provokatión ímóti dønum. Fara teir at góðtaka tað, ella fara teir at siga, at »hóv, hóv, her skal bara okkara flagg veittra«?

*Heldur tú, at tað kann koma undir heitið »list«?*

– í so føri má tað vera brúkslist. Annars kann tað ikki vera list.

*Er tað í lagi, at tað er sloppið at hanga í Listaskálanum, sum er tjóðsavnið?*

– Ja, tað haldi eg heilt avgjørt. Alt, sum kann fáa eitt kjak í lag, haldi eg, skal sleppa inn. Eg haldi, at Listaskálin skal vera ein depil, har tað verður diskuterað. At flaggið so eisini fer útaftur harfrá, tað er so nakað annað...



**Jóhanna**



*Hvat heldur tú um hetta nýggja flaggið?*

– Eg haldi í øllum førum ikki at tað er pent. Og eg haldi so avgjørt ikki, at tað skal koma í staðin fyri tað gamla flaggið.

*Heldur tú, at tað kann koma undir heitið »list«?*

– Ja, tað kann tað sikkurt, hví ikki tað.

*Er tað í lagi, at tað er sloppið at hanga í Listaskálanum, sum er tjóðsavnið?*

– So leingi tað kann koma undir heitið list, so kann tað gott hanga har. So leingi sum hatta ikki fer at súmbolisera Føroyar, so er í lagi.

**Hanna**



*Hvat heldur tú um hetta nýggja flaggið?*

– Eg haldi, at hatta verður eitt klandursflagg. Tað verður bara klammarí av tí.

*Heldur tú, at tað kann koma undir heitið »list«?*

– Ja, tað kundi tað í grundini nokk. Eg haldi, at hatta var smagfult funnið uppá.

*Er tað í lagi, at tað er sloppið at hanga í Listaskálanum, sum er tjóðsavnið?*

– Ja, lat tað bara tað. So leingi sum fólk bara fara niðan at hyggja at tí, og ikki fara at klandrast um tað.

**Torkil**



*Hvat heldur tú um hetta nýggja flaggið?*

– Tað veit eg ikki ordiliga. Eg havi onga meining um tað.

*Heldur tú, at tað kann koma undir heitið »list«?*

– Tað kann tað gott.

*Er tað í lagi, at tað er sloppið at hanga í Listaskálanum, sum er tjóðsavnið?*

– Ja. Tað er í lagi.

**Edmund**



*Hvat heldur tú um hetta nýggja flaggið?*

– Eg haldi, at hatta er ørskapur. Tey siga, at hatta skal vera tað, sum skal flagga uttanfyri ST, men eg haldi, at tey áttu heldur at roynt, at fingið Merkið at veittrað har.

*Heldur tú, at tað kann koma undir heitið »list«?*

– Tað havi eg ikki ánilsi av. Tað er sikkurt tað einasta tað kann brúkast til. Danskarar fara so ikki at góðtaka hatta flaggið. Og heldur ikki grønlendingar.

*Er tað í lagi, at tað er sloppið at hanga í Listaskálanum, sum er tjóðsavnið?*

– Ja, tað kann tað gott, tí har sær eingin tað, uttan tey, sum arbeiða har uppi. Eg fari so neyvan niðan at hyggja at tí, tað er so heilt sikkurt.

# Smiðjan verður flutt

**J.K. Joensen og sonur fara nú at flyta smiðjuna móti havnarlagnum í Miðvági. SMS tykist vera ein sannlíkur nýggjur leigari av bygninginum**

FLYTING
*Jákup Mørk*

Í langa tíð hevur smiðjuvirksemið hjá J.K. Joensen og soni hildið til norðuri í smiðjubygninginum í Miðvági.

Skjótt verður hetta tó søga, tí felagið hevur nú ítøkiligar ætlanir um at flyta virksemið oman á havnarlagið. Nakað sum stjórin eisini váttar, sampakkar betri við eitt virki, sum hevur so nógv virksemi knýtt at fiskivinnuni.

- Tað er eingin loyna, at ein flyting passar okkum betri. Bygningurin skuldi kanska ongantíð verið lagdur her norðuri yvirhøvur, sigur Jákup S. Joensen.

Hann sigur, at felagið ikki hevur í hyggju at selja verandi bygningin, men at talan helst verður um eina umbygging og leigumál.

**Nýggjur Bónushandil**

Tað hevur ljóðað, at Bónus verður nýggjur leigari av smiðjubygninginum, men hetta vil Jákup S. Joensen als ikki gera viðmerkingar til.

Heldur ikki stjórin í SMS, Hans Mortensen, vil gera viðmerkingar til hesi tíðindi, men hann váttar tó, at teir støðugt arbeiða við vakstrarætlanum fyri fyritøkuna.

Spurdur beinleiðis, um tær ætlanir eisini umfata at opna ein handil í Vágaøkinum er Niels Mortensen heldur ikki avnoktandi.

- Tað er í øllum førum ein nærliggjandi tanki. Men enn fáa vit so ikki sagt nakað ítøkiligt um tær ætlanirnar, staðfestir altso Niels Mortensen.